## DAGSINS MEINING

# Kristið hóvsemi

Mikudagin savnaðust hægstu umboð fyri heimsins kirkjur saman við muslimskum andaligum leiðarum á fundi í Rom. Endamálið við fundinum var at vísa aftur, at yvirgangur var nakað sum hevði við trúnna hjá heimsins leiðandi trúarsamfeløgum at gera.

Heimurin brynjar seg í hesum minuttum til kríggj móti yvirgangi. Hetta er yvirskriftin og soleiðis eigur hon at ljóða. Men undirtónin í tí ógvusliga tíðindaflutningi, sum hvønn dag kemur inn um dyrnar hjá fólk, kann eisini skiljast sum kríggj móti muslimum.

Í vanligari talu hoyrir tú eisini, at tað eru muslimar sum heild, sum hava ábyrgdina av, at álopið á World Trade Center gjørdist møguligt. Hetta er ikki so og verður ongantíð sagt nóg ofta.

Hóast tað eydnaðist Nazi-Týsklandi, eitt stórveldi í farnu øld, at gera tað alment satt, at jødar høvdu ábyrgdina fyri øllum órætti í Europa, so vita vit í dag at tað passar ikki. Jødar høvdu ikki størri ábyrgd av at illa gekk í samfelagnum enn onnur fólk.

Muslimar sum heild hava heldur ikki ábyrgdina av, at USA varð álopið 11. september. Tað eru helst yvirgangsmenn við muslimskari trúgv, sum hava fyrireikað og framt yvirgangin. Men tað kann ikki ábyrgdast vanligum trúgvandi muslimum.

Tí hevur tað ongantíð størri týdning enn nú hjá okkum, sum kalla okkum ein kristin tjóð, at vísa hóvsemi og ikki døma ella kasta fyrsta steinin.

Endamálið við yvirgangi er oftast at sáa ilt millum bólkar av menniskjum. Geva vit heimsins milliard av muslimun skylduna fyri herviliga álopið 11. september, so smílast teir, sum løgdu hesa skemdargerð tilrættis. So hava teir nátt tað teir ætlaðu, kríggj millum muslimar og kristin.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hvør svevur?

**Erhard Jacobsen**



Eg má siga, at eg, eins og ivaleyst fleiri onnur við mær, hvakk við, tá ið eg las orðini hjá tingmanninum, Jóannis Nielsen um, at fakfeløgini hava sovið í tímanum í eftirlønarspurninginum.

Í seinnu helvt av 80-árunum var eg virkin í Starvsmannafelagnum, og var tað nakað, sum vit arbeiddu við, so var tað at fáa greiði á eftirlønarspurninginum.

Felagið royndi ferð eftir ferð at fáa gongd á samráðingar um at betra eftirlønarviðurskiftini hjá limunum, men har var onki at heinta í nakrari samráðing. Millum annað gjørdu vit vart við, at tað var ongantið ov tíðliga at fáa loyst eftirlønarspurningin, tí tað krevur áramál at fáa eina eftirlønarskipan at virka.

Nevndin í Starvsmannafelagnum og landsstýrið vistu eisini væl, at tann eftirlønarskipanin, sum var avtalað fyri limir Starvsmannafelagsins í 1985, var bara ein byrjan. Kortini eydnaðist tað ongantíð at fáa nakra konstruktiva avtalu um, hvussu hendan eftirlønarskipanin skuldi útbyggjast.

Og hetta komst so ikki av, at fakfeløgini svóvu!

Tað er annars ikki fyrstu ferð, at eg havi hoyrt útsagnir um, at fakfeløgini gera ikki hetta ella hitt, og at tey fylgja ikki við í tí nýggja, sum hendir. Tú tímir ikki at svara slíkum møsni aftur, hóast tú væl veist, at fakfeløgini, í hvussu er, meðan eg var virkin har, høvdu nógvar konstruktivar tankar um eitt nú setanar- og lønarviðurskifti, starvsfólkapolitikk, nútímans arbeiðsrætt, útbúgvingarpolitikk v.m.

Einasti trupulleikin var, at tað vóru fakfeløgini, sum høvdu hesar tankar!

Nógvir av hesum tankum eru nú jargon millum tey, sum starvast á arbeiðsgevarasíðu, men kom ikki og sig, at fakfekløgini hava sovið í tímanum!

Ábyrgdina av teimum forsømilsum, sum nú kosta dýrt, eiga fakfeløgini so langt frá einsamøll. Tann heiðurin verða vit tíverri fleiri um at kanna okkum, teirra millum ikki minst okkara politikarar.

# Úr Carnegie Hall í Klingruna

TÍÐINDASKRIV

Næsta Orfeus konsertin veturin 2001-2001 verður í næstum.

Hesaferð verða tað teir báðir Rúni Bæk, fiól og Jóhannes Andreasen, klaver, sum fara at at spæla.

Fyrra konsertin í hesi røðini verður sunnukvøldið 7. oktober 2001 kl. 19.30 í Býráðshøllini í Runavík, og seinna konsertin verður í Norðurlandahúsnum mikukvøldið 10. oktober 2001 kl. 19.30.

Hetta verður fyrstu ferð, at Rúni Bæk fer at hava sjálvstøðuga konsert í Føroyum.

Rúni byrjaði at læra fiólspæl longu 4 ára gamal. Hann hevur lisið á konservatoriinum í Odense, og fekk solistprógv 1996.

Sama ár fekk hann fulltíðarstarv sum fyrsti fiólleikari í Det kongelige Kapel í Keypmannahavn.

Rúni hevur eisini fingið víðari útbúgving í New York, og í hesum býi hevur hann hann havt framførslur m.a. í Lincoln Center. Rúni hevur eisini spælt á ST-høvuðsborgini við fiól sínari — millum áhoyrararnar til ta konsertina var aðalskrivarin í ST Khofi Annan.



*Rúni Bæk*

Síðsta vetur vann Rúni Bæk "Annual Young Artist Violin Award", og partur av hesi virðisløn var ein debutkonsert í Carnegie Hall, sum var 4. mars 2001. Á hesi konsert spældi hann m.a. eitt stykki saman við bróðuri sínum Øssuri Bæk.

Jóhannes Andreasen tók prógv í klaverspæli og tónleikanáksfrøði á "Hochschule fur Musik und darstellende Kunst" í Wien, har hann hevði Walter Fleischmann sum lærara. Seinni las hann eina tíð á "International Menuhin Music Adademy" í Schweiz og eitt ár hjá Peter Feuchtwanger í London.

Umframt at starvast sum lærari í musikkskúlaskipanini hevur Jóhannes virkað sum tónleikari. Hann hevur tikið lut í fløguútgávum hjá Ectgraplatte, Kontrapunkt og Tutl, og hann er medstovnari av bólkunum Aldubáran og Musica Viva.

Á konsertskránni hjá Rúna og Jóhannesi eru m.a. Carmenfantasiin eftir Pablo de Sarasate. Hetta er eitt av teimum verkum, Rúni framførdi á Carnegie Hall fyrr í ár. Haraftrat spæla teir verk eftir Mozart, Bartók og Brahms.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




## VIÐMERKINGAR

# Vælferðarblokkurin

**Heri Mohr**



Nú oyðileggjandi kykt í vælferðarblokkinum, ætlaður gomlum og avlamnum og sjúkum og ávísum skúlum, so ræðandi er komið til sjóndar, er alneyðugt, at sannleikin verður hjálptur úr tí hættisliga kvørkratakinum, sum við støði í ósannindum og indoktrinerandi øsing í skjótt 4 ár hevur órógvað lívsmegi og -gleði teirra gomlu, avlamnu og sjúku. Sum ein uppøstur segði nú ein dagin: hetta er terror við lít.

Í hesum tíðarskeiði eru so áhaldandi hóttanir komnar um her-og-nú-broytingar av okkara samfelag, at fólk – vælvitandi at hastverk er lastverk – spyrja, hví tað er so umráðandi at broyta okkara annars vælvirkandi samfelag so destruktivt og irrationelt. Fer tað at verða betri og lættari at búgva í Føroyum, tá ið vælferðarblokkurin er burturbeindur og støðið undir honum yvirtikið, eins og dómsvaldið, løgreglan, fólkakirkjan, skipasýnið o.a.m. verður yvirtikið? Og hvussu við tí europeiska kulturinum, er hann ikki í øldir komin til okkara í og úr Danmark?

Nei, góðu tit, steðgið karrusellini, áðrenn vit øll gerast trillandi í ørviti, og avrikið og tilveran verður hareftir.

Um tað gongur sum landsstýrið vil, fer landskassin í 2002 at fáa 356 milliónir minni í inntøkum til almannamál og skúlamál, tí ætlanin er at skerja blokkin við nevndu upphædd, og tá fer, sum vituligt er, okkara sosiali tryggleiki at fáa ein dyggan undir vangan.

Sum flest øllum kunnugt, so sá blokkurin dagsins ljós 1. januar 1988 (hann avloysti ein part av tá galdandi refusiónsskipan). Hendan avtalan um blokk í staðin fyri refusión varð samtykt av løgtinginum í apríl 1987, og vert er at leggja merki til, at ein minniluti (Anfinn Kallsberg) í fíggjarnevndini atkvøddi fyri uppskotinum við teirri viðmerking, at »Ein føst upphædd í staðin fyri lutfalsliga refusión økir um ábyrgdina hjá løgtinginum og føroysku myndugleikunum kann tí bert vera eitt stig fram móti størri sjálvbjargni«.

Í notati til avtaluni um blokkskipan frá 9. mars 1987 er tilskilað, at »Indenfor en ramme på 6 mill. i årlige statslige merudgifter i 1987-prisniveau justeres satserne på pensionsrådet, således at der med hensyn til forskelle i beskatning m.v. sikres samme disponible indkomst til pensionsmodtagere på Færøerne og i Danmark. Det forudsætter, at der gennemføres kompenserende besparelser på 5.5 mill. kr.« Tað kundi verið áhugavert at vita, nær hesar nevndu justeringar hildu uppat, og hvussu tann disponibla inntøkan (indkomst) er í Føroyum og í Danmark.

Við fyrivarni kann sigast, at av blokkinum upp á 969 milliónir eru uml. 210 mil. til skúlar og lesandi og uml. 500 mió. til fólkapensión, avlamispensión, einkjupensión og aðrar almennar veitingar, og restin er til heilsuverkið. So er at spyrja: Hvussu er býtið av teimum umleið 356 mió., sum landsstýrið av sínum eintingum fer at kuta av blokkinum? Hvat verður yvirtikið av almannamálum, og hvat verður yvirtikið av skúlamálum?

Tað hevði ikki verið meira enn rímiligt og sjálvsagt, at vit, sum í hesum landi búgva, fingu at vita, hvørji av niðanfyri nevndu málsøkjum, sum p.t. eru í blokkijnum, verða yvirtikin 1. januar 2002:

Sí talvu!

Um feilir ella villur eru í hesari sundurliðing, verður tað vónandi rættað frá kompetentari síðu.

Nú 3 mánaðar áðrenn blokkurin verður skerdur við 356 milliónum, er tað okkara demokratiska krav, at avvarðandi landsstýrismenn fráboða Føroya fólki, hvørji av omanfyri nevndu málsøkjum verða yvirtikin tann 1. januar 2002.

At spyrja og at svara opið og ærliga er sjálvsagdur rættur og skylda – ein av súlunum undir demokratinum –, og vit eiga ikki at gloyma, at onki svar at geva, er versta svarið, ið verður givið, og tá rillar tað viðkvæma demokratiska frælsið, sum, hóast mangan skilaleyst pleyrað og hógvað, áhaldandi vísir sína blómu, vøkur og følin.

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Almannamál** | | | | | |
| Pensiónir | Løgtingsjáttanin | er | 50% | í | blokkinum |
| Dagstovnar | " | " | 25% | " | " |
| Onnur almenn forsorg | " | " | 25% | " | " |
| Ellis- og røktarheim | " | " | 40% | " | " |
| Heimahjálp | " | " | 50% | " | " |
| Dagpeningur | " | " | 40% | " | " |
| Vistarheim | " | " | alt | " | " |
| Andveikraverndin, serforsorg | " | " | alt | " | " |
| Dagstovnar | " | " | alt | " | " |
| **Skúlamál** | | | | | |
| Fólkaskúlalæraralønir | " | " | 55% | " | " |
| Maskinskúlin | " | " | alt | " | " |
| Handilsskúlin | " | " | alt | " | " |
| Tekniskir skúlar | " | " | alt | " | " |
| Skúlaheim | " | " | alt | " | " |
| Læraraskúlin | " | " | alt | " | " |
| Serstøk frítíðarundirvísing | " | " | alt | " | " |
| Útbúgvingarstuðul | " | " | ? | " | " |
| Skúlin á Trøðni | " | " | 75% | " | " |

# Talvudagur fyri Sunnudagsskúlan hjá Heimamissiónini

TÍÐINDASKRIV

Sunnudagsskúlin hjá Kirkjuligu Heimamissiónini virkar í nærum øllum bygdum í landinum. Fólk í øllum aldri minnast aftur á barnaár har ein náttúrligur partur av sunnudegnum var at fara í sunnudagsskúla. Ígjøgnum mong ár hava trúgvir sunnudagsskúlalærarar verið við at boða boðskapin um Jesus Kristus fyri børnum. Í alt 52 sunnudagsskúlar eru tilknýttir sunnudagsskúlan hjá Heimamissiónini. Umframt hetta hava eisini 5 sunnudagsskúlar í Danmark tilknýtið til Heimamissiónina í Føroyum. Tilsamans á hesum sunnudagsskúlum eru uml. 2.500 børn, sum trúliga møta upp viku eftir viku, hóast tilboðini til børnini eru mong í dag.

Sunnudagsskúlin hevur eina landsnevnd, hvørs uppgáva er at stuðla arbeiðinum, ráðgeva sunnudagsskúlalærarum og skipa fyri landsarbeiðinum kring landið. Til at samskipa tær ymisku og fjølbroyttu arbeiðsuppgávurnar í tí dagliga hevur sunnudagsskúlin ein barnaráðgeva í starvi.

Landsnevndin er skipað við umboðum úr øllum landinum og stendur á odda fyri arbeiðinum, sum Sunnudagsskúlin hjá Heimamissiónini ger.

**Summarlegur**

Vit hava ta gleði at siga frá, at aftur var luttøkan í ár til summarlegurnar stór. Tað vóru íalt 11 barnalegur, ein í Porkeri, ein í Sørvági, ein í Nólsoy, ein á Viðareiði, og sjey í Leguhúsinum í Nesvík, har íalt uml. 1000 børn luttóku umframt leiðarar. Hetta er størsta tiltakið hjá Sunnudagsskúlanum.

Á summarlegum er bæði gaman og álvara á skránni hvønn dag. Børnini fáa eitt uppgávuhefti til bíbiltímar, sum verða hildnir hvønn dag á leguni, tey hava ymiskar kappingar, gera ítriv, fara útferðir o.m.a.

**Talvudagur**

Sunnudagsskúlin hjá Heimamissiónini hevur hvørt heyst ein talvudag í kirkjum okkara. Her verður savnað inn til arbeiðið, sum sunnudagsskúlin ger. Í ár verður talvudagurin komandi sunnudag 7. okt.

Landsnevndin takkar hjartaliga fyri vælvild frá kirkjuráðum og kirkjufólki og fyri gávuna, sum kemur inn.

# Arkitektar nøgdir við nevndina

TÍÐINDASKRIV

Arkitektafelag Føroya hevði um vikuskiftið aðalfund í Havn.

Rúni Abrahamsen varð afturvaldur til formann. Eisini var Albert Isfeld afturvaldur í nevndina og er kassameistari. Magnus Magnussen er skrivari í felagnum.

Tað er í ár 20 ár síðani at Arkitektafelag Føroya varð stovnað og á hátíðarhaldi í leygarkvøldið var Gunnar Hoydal heiðraður til heiðurslim í felagnum.

GÓÐIR BRÚKTIR BILAR